

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 10 - 2012

# Funnu nógva olju og gass

Myndafrásøgn - Næmingar á miðnámsskúlum á Kambsdali og í Havn hava seinastu dagarnar funnið eina rúgvu av olju og gassi í spennandi kapping, sum er partur av PetroChallenge skeiði, har tey leita eftir olju í lærisimuleringini OilSim. Næmingarnir hava verið í 37 bólkum, og hvør bólkur er eitt oljufelag. Avbjóðingin er at finna olju ella gass í rakstrarverdum nøgdum, og hetta verður gjørt við at keypa og granska umhvørviskanningar, magnetiskar kanningar, tyngdakraftskanningar, seismiskar kanningar, umframt at bjóða uppá leitiloyvi, seta í verk sosialar verkætlanir, gera íløgur í onnur leitiloyvi, bora leitibrunnar og granska úrslitini av brunnunum. Høvuðsendamálið við skeiðinum er at styrkja um fatanina hjá miðnámsskúlanæmingum av oljuvinnuni og hvørjir arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar eru. Lærarar á teimum báðum handilsskúlunum og Føroya Studentaskúla og HF-skeiði hava verið á vegleiðaraskeiði, og teir hava leitt PetroChallenge skeiðið. Skeiðið endaði við kapping, har málið var at finna mesta virðið av olju og gassi. Vinnandi bólkurin umboðar Føroyar í altjóða PetroChallenge finaluni í London í januar. Hann gjørdist Oljusjeikarnir á Føroya Studentaskúla í Hoydølum. Hetta er 10. ferðin síðani 2002, at skipað verður fyri PetroChallenge skeiði á føroyskum miðnámsskúlum. Statoil stuðlar PetroChallenge Føroyar, sum er fyriskipað av Simprentis í samstarvi við FOÍB. Sí myndafrásøgn frá kappingini aðrastaðni á síðuni.